

## Jón Johannesen skal venja TB

Jón Johannesen skal komandi kappingarár standa á odda fyri TB. Tað vórðu spælararnir kunnaðir um á fundi seinnapartin leygardagin. 41 ára gamli Jón Johannesen hevur slitið sínar barnaskógvar í felagnum. Hann spældi í fleiri ár á besta liðnum, og stóð eisini á odda fyri liðnum í 2003 og 2004. Og síðst, hann var í starvinum sum venjari eitt heilt kappingarár, hilnaðist somikið væl, at liðið vann sær uppflyting úr næstbestu deildini.



Landsliðsvenjarin hjá hondbóltskvinnunum, Claus Rasmussen, hevur fyribils tikið út ein bruttohóp við 28 spælarum

Mynd: Álvur Haraldsen

# Fáa ein mánað at prógva seg

**Landsliðsvenjarin, Claus Rasmussen, hevur valt sær bruttohópin til Challenge-Trophy, sum hesa ferð verður í Letlandi. Nú fáa spælararnir seks vikur til at prógva, hvør teirra skal við til kappingina**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tríggjar ferðir á rað hava Føroyar vunnið silvur í Challenge-Trophy kappingini í kvinnuhondbólti.

Fjórða royndin verður gjørd í apríl mánaði í Letlandi, sum er vertur hesaferð, og nú hevur Claus Rasmussen boðað frá, hvørjar tær eru, sum kappast um pláss í hópinum.

Seinasta árið hevur Claus Rasmussen annars arbeitt við einum U-landsliðshópi, og flestu av spælarunum, sum hava verið við her, eru eisini í bruttohópinum, sum nú er kunngjørdur.

– Ætlanin hevur alla tíðina verið, at vit skuldu geva øðrum møguleikan, tá Challenge-Trophy nærkast, men í fyrstu atløgu valdu vit at arbeiða við einum sera ungum hópi.

– Nú havi eg so roynt at valt á leið fýra spælarar til hvørt plássið. Eg havi tosað við hvørja einstaka av hesum, og saman við Hans Mikkelsen, fysiskum venjara, og Mildrið Jacobsen, hjálparvenjara, havi eg so savnað data inn upp á einstøku spælararnar. Tær hava fingið at vita, at endaligi hópurin verður úttikin, eftir at danska U-19 landsliðið hevur verið á vitjan, og so fáa vit at síggja, hvørjar tá eru best fyri, sigur Claus Rasmussen.

Og hann leggur dent á, at tá vera tað akkurát tær, sum eru best fyri, ið verða bidnar um at koma við.

– Tá hópurin verður úttikin, verður talan um tríggjar málverjar og annars tvær til hvørt plássið úti á vøllinum. Og tað verða tær 15, sum eru best fyri, sum verða úttiknar. Og so er tað líkamikið, um spælarin er 17 ella 28 ár. Tí landsliðið er sett saman av teimum bestu, sigur venjarin avgjørdur.

Donsku europameistararnir fyri U19-landslið vitja í Føroyum seinnapartin av februar mánaði. Tær spæla tríggjar venjingardystir á ferðini, og út fraá hesum og teimum fysisku mátingum, sum støðugt verða gjørdar, verður endaligi landsliðshópurin úttikin.

## Bruttohópurin

**Málverjar:**
Erla Eliasen, Aalborg
Fríða Petersen, Neistin
Guðrun í Lágabø, Tjaldur
Ruth Mohr Heen, Neistin
Viviann Petersen, VÍF

**Vinstri veingir**
Susanna Petersen, Kyndil
Tóra Seloy, VÍF
Unn Kragesteen, Neistin
Una Egilsdóttir, VB

**Vinstri bakkar**
Bára Berthelsen, StÍF
Liljan Durhuus, VÍF
Simona Petersen, Stjørnan

**Miðleikarar**
Agnes Olsen, VÍF
Durita Ljósstein, Stjørnan
Joan Djordjevic, Stjørnan
Katrin Á Neystabø, Neistin
Marjun Danberg, Neistin

**Strikur**
Anja Heinadóttir, Neistin
Durita Mikkelsen, Stjørnan
Una Olsen, Stjørnan

**Høgri bakkar**
Durita Christophersen, Stjørnan
Heidi Joensen, VÍF
Louisa Andreasen, Neistin
Ninna Johansen, Virum

**Høgri veingir**
Elisa Leo, VÍF
Halla Midjord, VÍF
Judith Hansen, Stjørnan
Unnur Danielsen, Neistin